# Fólkatalið í Vágum økist

**Fyrstu sjey mánaðirnar í ár var størsti fólkavøksturin í landinum í Vágoynni. Færri fólk búgva í norðast parti av landinum**

FÓLKATAL
*Eyðun Klakstein*

Nýggj uppgerð frá Hagstovu Føroya vísir, at tað eru vorðnir 80 fleiri vágamenn í ár.

Í uppgerðini, sum staðfestir broytingar í fólkatalinum fyrstu sjey mánaðirnar í ár, er fólkavøksturin í Vágoynni tann størsti – trý prosent.

Tá hetta árið byrjaði búðu 2.648 fólk í Vágum, meðan hesi nú eru vorðin 2728. Hetta er ein vøkstur upp á 80 fólk, sum serliga stavar frá tilflyting. Burðaravlopið var frá januar til juli 11, meðan nettoflytingin var 69 fólk.

Spurningurin er so, um hetta hevur nakað tilknýti til undirsjóvartunnilin um Vestmannasund at gera.



*Lutvíst størsti fólkavøksturin frá januar til juli var í Vágoynni, og spurningurin er um tað hevur nakað tilknýti til undirsjóvartunnilin, sum er í gerð*

## Minkar norðanfyri

Meðan flestu økini í landinum hava havt fólkavøkstur fyrstu sjey mánaðirnar í ár, hevur norðasti parturin av landinum verið fyri mannfalli.

Í norðoyggjum búgva nakað færri fólk nú enn við ársbyrjan, og minkingin stavar serliga frá Klaksvíkarøkinum. Har búðu 23 fólk færri í juli enn í januar, og kemur hendan minking av fráflyting.

Restin av norðoyggjum hevur verið fyri lítlum vøkstri, men samanlagt er talan um eina lítla afturgongd.

Í Klaksvíkarøkinum búðu síðst í juli 5.206 fólk, meðan restin av Norðoyggjum hevði 722 íbúgvar.

Lítil minking er eisini í fólkatalinum í norðara parti av Eysturoynni, hóast her er talan um evarska lítla minking upp á 1 fólk. Í hesum øki búðu í juli 1.576 fólk.

## Fleiri sumbingar

Sunnast í Føroyum er góður vøkstur í fólkatalinum, tí fyrstu sjey mánaðirnar í ár vaks fólkatalið í Sumba við 24 fólkum, og í Skálavík á Sandoynni gjørdust tey 23 fleiri. Tað hevur við sær ein prosentvøkstur upp á heili 13,5%.

Hóast Runavík hevur fingið oljuhavnina, so er tað Gøta, sum er lutvíst vaksin mest í fólkatali fyrstu mánaðirnar av árinum. Í Gøtu gjørdust tey 26 fólk fleiri og eru nú 994, meðan tey vórðu 36 fleiri í Runavík og eru 2.511.

Tórshavnarøkið veksur støðugt, og fyrstu sjey mánaðirnar í ár gjørdust tað 291 fleiri fólk í høvuðsstaðarøkinum, sum eisini umfatar Kollafjørð.

Samanlagt fyri allar Føroyar er talan um vøkstur í fólkatalinum upp á 1,3 prosent. Tað gjørdust 620 fleiri føroyingar frá januar til juli, og hesin vøkstur stavar fyrst og fremst frá tilflyting.

Síðsta dagin í juli búðu 46.816 fólk í Føroyum.

# Hava sett kósina heim



*Leygardagin fóru Graham og Anne Evans úr Klaksvík, eftir at tey høvdu bíðað eftir nýggjum bummum til seglini í tvær vikur*

**Bretsku hjúnini, sum vóru strandað í Klaksvík í tvær vikur, fóru um vikuskiftið avstað. Leiðin var løgd heim til Onglands**

ÓHAPP
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin fór lítla seglskipið Fyne Spirit úr Klaksvík, har tað lá í meira enn tvær vikur, eftir at skipið hevði fingið skaða í illveðri í ein útnyðring úr Føroyum.

Graham og Anne Evans, sum sigla við skipinum, vóru á veg úr Íslandi og heim til Onglands, tá tey komu í ringt veður einar 100 fjórðingar úr Føroyum.

Báðir bummarnir til seglini brotnaðu, og so noyddust tey at fylgja rákinum og endaðu í Klaksvík, har tey eisini vóru, áðrenn leiðin varð løgd til Íslands.

Tey noyddust at bíða eftir, at bummarnir skuldu koma til Føroya, og tað tók nakað av tíð.

## Bummarnir

Leygardagin komu teir serligu bummarnir úr Onglandi við farmaskipi, og tá bummarnir vóru komnir upp, legði Fyne Spirit úr Klaksvík.

Graham og Anne Evans leggja nú leiðina heim til Plymouth, har tey fara at arbeiða í nakrar mánaðir, áðrenn tey leggja leiðina suðureftir.

Ætlanin var á ferðini norðureftir eisini at vitja Noreg, men tann parturin av ferðini er sligin av.

Fyri framman er ein long ferð til Falklandsoyggjarnar, New Zealand, Suðurafrika og onnur lond. Á ferðini ætla tey bæði at steðga á fyri at arbeiða.

# Vinarbýir hava gjørt fløgu

**Seks norðurlendskir vinarbýir, har Klaksvík er ein teirra, hava gjørt fløgu, sum bjóðar tónleik frá teimum ymsu býunum**

MOSAIKK
*Eyðun Klakstein*

Klaksvík og fimm norðurlendskir vinarbýir hava gjørt eina fløgu við tónleiki, sum umboða teir seks býirnar á ymsan hátt. Fløgan, sum kallast Mosaic, er nú liðug, og hon bjóðar 18 skeringar við kórsangi og symfoniskum tónleiki.

Tað var Jógvan við Keldu, sum í 1997 kom við hugskotinum til fløguna. Hetta hendi á fundi millum borgarstjórarnar úr teimum seks vinarbýunum, og hugskotið fekk góða móttøku.

Tore Engstrøm úr Tróndheimi var settur at samskipa útgávuna, og hann hevur staðið fyri at savna tónleikin frá teimum seks býnunum. Umframt Klaksvík er talan um Kópavág, Odense, Norrkøping, Tampere og Tróndheim.

Fyri Klaksvík arbeiddi Dávur Winther við útgávuni.




*– Tónlistin og sangur er helst tað, sum sjóðar fólk einamest saman, og tí helt eg, at tað var eitt gott hugskot við hesi fløguni, sigur Jógvan við Keldu*

## Gott støðið

– Útgávan hevur verið stórarbeiði hjá samskiparanum, men hann er komin sera væl frá uppgávuni, sigur Jógvan við Keldu, sum nú kann fegnast um, at hugskotið er vorðið veruleiki.

– Á fløguni luttaka bæði amatørar og professionell, og samanlagt liggur støðið á rættiliga høgum støði, heldur Jógvan við Keldu.

Klaksvík er umboðað við Frændum og 17 sangarum. Frændur syngja og spæla »Hvítar flykrur« saman við Føroya Symfoniorkestri, meðan 17 sangarar syngja »Juni«, sum Hans Jacob Glerfoss yrkti og Knút Olsen gjørdi lag til.

Harafturat syngja 17 sangarar saman við solistum úr Kópavági eisini sangin »Lítla flugan«.

– Tónlistin og sangur er helst tað, sum sjóðar fólk einamest saman, og tí helt eg, at tað var eitt gott hugskot við hesi fløguni, sigur Jógvan við Keldu.

Fløgan er ætlað sum gávulutur og fæst í fyrstu syftu ikki sum søluvøra.



# Ráðaloysi og vónloysi millum lærarar

**Alt ov fáir tímar eru játtaðir til serligan tørv í skúlaárinum, sum júst er byrjað.
- At føla, at man sum lærari ikki megnar at geva øllum í flokkinum eina góða undirvísing, er ógvuliga svárt. Eg síggi í eygunum á hvørjum næmingi, ikki minst teim veiku, eitt neyðarróp um hjálp, sigur Paulina Poulsen, lærari**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Nógvir næmingar við serligum tørvi, antin teir eru menningartarnaðir, rørslutarnaðir ella hava eitthvørt annað brek ella tørv sum ger, at teimum tørvar serligan stuðul í skúlanum, fáa ongan ella lítlan og ongan stuðul í hesum skúlaárinum. Í ár hevur Sernámsdepilin vegna allar skúlarnar í Føroyum søkt Mentamálastýrið um gott og væl 2500 tímar. Tá ið avtornaði fekk Sernámsdepilin slakar 1200 tímar at luta út og hetta er nøkulunda sama tal sum í fjør. Í viðtali í summar segði Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum, at allar umsóknirnar um tímar til serligan tørv vóru væl grundaðar og rímiligar, men stovnurin varð noyddur at lúka burturúr.



*- Veiku næmingarnir hava akkurát líka góðan rætt til skúlagongd sum onnur. Teir skulu ikki gerast til syndabukkar, tí myndugleikarnir ikki geva skúlunum nóg góðar umstøður at virka, sigur Paulina Poulsen, lærari á Eysturskúlanum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Eingin skúli hevur fingið tað sum søkt er um. Onkur skúli hevur bara fingið ein triðing, segði hann.

Ein skúli, sum hevur fingið væl minni, enn søkt varð um, er størsti skúlin í landinum, Eysturskúlin. Talið á tímum til serligan tørv er nøkulunda tað sama sum seinasta skúlaár, men í ár eru nógv fleiri næmingar á skúlanum - ein heilur flokkur afturat í mun til seinasta skúlaár. Skúlin søkti um 121 tímar, men fekk bara 38. At næmingar, sum hava serligan tørv á stuðli og hjálp í undirvísingini, onga fáa, ger uppgávuna hjá lærarunum ógvuliga trupla - fyri ikki at siga ómøguliga.

- Nýggja fólkaskúlalógin leggur upp til nógv ymiskt, sum krevur nógv av hvørjum næmingi sær. Men sum lærari ber ikki til at lúka tey krøv, sum lógin ásetur, tá ið tveir-tríggir næmingar við serligum tørvi eru í flokkinum og onga hjálp fáa. Hesir næmingarnir krevja veruliga, at ein lærari situr hjá teimum stóran part av tíðini og hjálpir teimum.

## Neyðarróp

Eysturskúlin hevur saman við foreldrum at børnum við serligum tørvi roynt at tosa við avvarðandi myndugleikar, tað vil siga Sernámsdepilin og Mentamálastýrið, fyri at fáa fleiri tímar játtaðar til hesi børnini, sum hava eins góðan rætt til eina góða skúlagongd eins og øll onnur. Svarið tey hava fingið er, at eingir pengar eru til taks til endamálið.

- Tá ið støðan er soleiðis, ber ikki til sum lærari at geva næmingunum ta undirvísing, teir hava krav á, hvørki teim sterku ella teim veiku næmingunum. Eg leggi ógvuliga stóran dent á, at næmingarnir sosialt hava tað gott við hvønn annan og saman. Men at føla, at man sum lærari annars ikki megnar at geva øllum í flokkinum tað tey eiga at fáa fakliga, er sera svárt. Hetta er hart, tí eg síggi í eygunum á hvørjum næmingi, ikki minst teim veiku, eitt neyðarróp um hjálp. Sum nýmótans lærari havi eg ein brennandi hug at geva alt eg orki, avbjóðingarnar eru nógvar og spennandi, og teir flestu næmingarnir vilja sjálvandi alla tíðina frameftir. Veiku næmingarnir hava akkurát líka góðan rætt til skúlagongd sum onnur. Teir skulu ikki gerast til syndabukkar, tí myndugleikarnir ikki geva skúlunum nóg góðar umstøður at virka, sigur Paulina Poulsen.

Paulina Poulsen setur spurnartekin við, um skúlin er fyri øll, tá ið hann frá myndugleikunum ikki fær neyðugu orkuna til at veita øllum næmingum eina líkinda skúlagongd.

- Sosialt hevur tað ógvuliga stóran týdning, at næmingar við breki ganga í fólkaskúlanum. Tað er í grundini gott fyri øll. Men hvørki fysisku karmarnir, tilfar ella orka sum heild eru til staðar. Tað, sum undrar ikki sørt er, at nógvir næmingar, sum hava serligan tørv, fáa góðan stuðul aftaná skúlatíð. Hendan stuðulin veitir Almannastovan.

- Tað sigur seg sjálvt, at hesum næmingum eisini tørvar stuðul í skúlanum, tí tá eru teir saman við nógvum øðrum børnum, og skulu virka í skúlahøpi, sigur Paulina Poulsen.

Tað eru tvey ár síðani Paulina Poulsen byrjaði sum lærari á Eysturskúlanum.

- Tað er einki annað eg heldur vil enn arbeiða sum lærari. Lærarayrkið er mítt lívsstarv. Eru umstøðurnar góðar, er lærarastarvið tað besta starvið sum er til. Tað er eitt lívsjáttandi og gevandi starv at undirvísa og hava við børn at gera. Men sum umstøðurnar eru nú, føli eg bara vónloysi. Tað er nógv minni hugaligt at vera lærari nú, ráðaloysið millum lærarar er stórt og tú sært tað allastaðni. Og at skúlaleiðslur og lærarar ikki í nógv størri mun gera vart við vánaligu støðuna í fólkaskúlanum í dag, ger ráðaloysið millum lærarar størri, sigur Paulina Poulsen, sum umhugsar um hon skal leita sær eftir einum øðrum arbeiði.

# Foreldur átala

**Børn, sum tørvar stuðul í skúlanum, eiga ongan góðan í føroyska skúlaverkinum. - Vit kenna okkum sera einsamøll og hjálparleys, sigur mamma at menningartarnaðum barni**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Í vikuni, tá ið skúlarnir fóru í summarfrí, fingu foreldur hjá næmingum við serligum tørvi, sum ganga í Eysturskúlanum í Havn, at vita, hvussu fáir tímar skúlin hevði fingið tillutað til hesar næmingarnar. Skúlin hevði søkt um 121 tímar, men bara 38 tímar vóru játtaðir. Foreldrini høvdu fund um málið beint sum boðini bórust og undirskrivaðu eina átalu, sum varð send landsstýrismanninum í mentamálum. Tey hava síðani einki frætt úr Mentamálastýrinum.

Foreldrini átala, at játtanin til undirvísing vegna serligan tørv er skorin so nógv niður, at undirvísingin, sum frammanundan ikki var nøktandi, í skúlaárinum 2001/2002 er minkað við meiri enn eini helvt. Skal tað vakra endamálið, at skúlin skal vera fyri øll hava nakra meining, má hetta fáast í rættlag sum skjótast, siga tey.

- Fakliga klára børn við serligum tørvi als ikki at fylgja við, tá ið tey onga eyka hjálp fáa í skúlanum. Tá ið fleiri børn við serligum tørvi eru í einum flokki og lítla og onga hjálp fáa, er spurningurin um tíð, til lærarin ikki orkar longur, uttan mun til, hvussu eldhugaður viðkomandi er, sigur mamma at menningartarnaðum barni. Hon velur at vera ónavngivin fyri at verja barnið. Undanfarnu ár hevur barn hennara fingið stuðul í skúlanum fleiri tímar um vikuna, okkurt árið átta tímar. Hví eingin stuðul er játtaður í ár, hevur hon ikki fingið neyvari frágreiðing um - uttan hana, at eingir pengar eru.

- Barnið hjá mær spyr enn eftir stuðlinum, tað hevði í fjør. Eg havi ikki torað at sagt, at stuðulin ikki kemur aftur. Hóast mítt barn elskar at ganga í skúla og stórtrívist í flokkinum, er tað ógvuliga hugstoytt, at eingin stuðul er. Hetta oyðileggur allan flokkin og eg hugsi eisini nógv um hinar næmingarnar, sigur mamman.

Eyðsæð loysir tað ongar trupulleikar ikki at veita børnum við serligum tørvi, hjálp í skúlanum.

- Eg eri sannførd um, at tað er dýrari fyri samfelagið einki at gera. Fáa børn við serligum tørvi góða hjálp í skúlanum, kosta tey samfelagnum lítið, tá ið tey gerast vaksin. Øvugt kosta tey samfelagnum nógv, um tey onga hjálp fáa sum børn, sigur mamman.



*- Skúlin er so ómetaliga týdningarmikil fyri okkara børn, men vit síggja bara, hvussu lítið hann verður raðfestur, sigur Diana í Puntabyrgi, forkvinna í Javna*

## Stórt máttloysi

Á skrivstovuni hjá Javna merkja tey hjálparloysið hjá foreldrum at menningartarnaðum børnum, sum tørvar serliga hjálp í skúlanum.

- Trupulleikin er ovurhonds stórur, og hann er nógv størri í ár enn undanfarnu ár. Skúlin er so ómetaliga týdningarmikil fyri okkara børn, men vit síggja bara, hvussu lítið hann verður raðfestur, sigur Diana í Puntabyrgi, forkvinna í Javna.

Javni hevur verið í sambandi við Sernámsdepilin, sum tillutar stuðul til børn við serligum tørvi.

- Nógv børn, sum hava fingið stuðul undanfarnu ár, hava mist stuðulin í ár. Stuðul eigur ikki at verða tikin frá børnum, tí onnur børn tørvar stuðul. Øll, sum ikki fáa, eru við sviðusoð, og nógv fáa alt ov lítið. Nógv foreldur hava víst á, at børn teirra vóru í eini menning, tí tey fingu stuðul. Við ongum stuðli steðgar øll menning, og tað er sera harmiligt.

Javni arbeiðir miðvíst við at varpa ljós á viðurskifti hjá menningartarnaðum í Føroyum, og hevur í sambandi við vánaligu umstøðurnar í fólkaskúlanum í hyggju at seta seg í samband við landsstýrismannin í mentamálum fyri at viðgera trupulleikan.

- Vit eru ikki komin nógv longri í dag í mun til fyri tíggju árum síðani, tá ið avgjørt varð, at fólkaskúlin er fyri øll. Prinsippið er gott, men skúlin er ikki búgvin at taka ímóti øllum næmingum. Hugburðsbroyting skal eisini til, tí ikki allir lærarar halda, at skúlin skal vera fyri øll, sigur Diana í Puntabyrgi.